Vestmanna Kommuna
Bakkavegur 8 · Postboks 91 · FO-355 Vestmanna
Tlf. 770 100 · Fax 770 101
vestmanna@vestmanna.fo
www.vestmanna.fo

# Viðtøkur fyri foreldraráðið fyri dagstovnaøkið í Vestmanna Kommunu

## Grein 1
## Endamál foreldraráðsins

a. At fremja so væl sum tilber áhugamál foreldranna í samband við leiðara og dagstovnaøkið.
b. At geva leiðaranum ráð og vegleiðing (sambært grein 9, stk. 1, í dagstovnalógini). Ráðgevingin er ikki bindandi fyri leiðaran. Harafturat skal ráðið arbeiða fyri at bøta og styrkja um samstarvið ímillum foreldrini, dagstovnaøkið og kommununa.

## Grein 2
## Heiti

Foreldraráðið fyri dagstovnaøkið í Vestmanna Kommunu.

## Grein 3
## Foreldraráðslimir

Í foreldraráðið kunnu veljast øll foreldur ella verjar, sum hava børn í ansing í dagstovnaøkinum hjá Vestmanna Kommunu.

## Grein 4
## Atkvøðurættur

Foreldur ella verjar hava eina atkvøðu hvør uttan mun til, hvussu nógv børn tey hava í ansing í dagstovni hjá Vestmanna Kommunu.

## Grein 5
## Ráðið

- Leiðarin tekur stig til, at foreldraráðið verður valt.
- Foreldraráðslimur verður valdur fyri tvey ár.
- Foreldraráðið verður valt á foreldrafundi ólíka ár.
- Í foreldraráðnum skulu vera 4 limir og ein varalimur fyri hvønn limin. Alt dagstovnaøkið skal vera umboðað.
- Bæði kynini eiga at vera umboðað í foreldraráðnum og ímillum varalimirnar.
- Foreldraráðið skipar seg við formanni, næstformanni og skrivara.
- Fer barn hjá ráðslimi av stovninum, fer ráðslimurin frá, varalimur tekur við, og nýggjur varalimur verður valdur.
- Foreldraráðið hevur fund í minsta lagi eina ferð um ársfjórðingin.
- Foreldraráðið tekur mál upp, sum foreldur skrivliga leggja fyri ráðið.
- Skrivarin skrivar fundarfrásøgn/gerðabók, sum skal góðkennast og undirskrivast av ráðslimunum eftir fundin ella á fyrstkomandi fundi.
- Ráðslimirnir fáa í mesta lagi eina fundarsamsýning hvønn ársfjórðing, treytað av at fundur hevur verið hildin (sí grein 2, stk. 2, 1 í kunngerð um samsýning v.m. sambært kommunustýrislógini).

Vestmanna Kommuna
Bakkavegur 8 · Postboks 91 · FO-355 Vestmanna
Tlf. 770 100 · Fax 770 101
vestmanna@vestmanna.fo
www.vestmanna.fo

**Grein 6**
**Foreldrafundir**

Foreldrafundurin er hægsti myndugleiki í øllum viðurskiftum ráðsins.

Foreldrafundurin, sum leiðarin kallar inn til, verður hildin í september við hesi skrá:

a. Frásøgn frá leiðaranum um farna ár.
b. Frásøgn frá foreldraráðnum.
c. Val av limum og varalimum til foreldraráðið.
d. Innkomin mál.
e. Ymiskt.

Foreldrafundur kann eisini verða hildin eftir umbøn foreldranna.
Uppskot til fundin skulu vera leiðaranum í hendi í seinasta lagi 7 dagar fyri fundin.

**Grein 7**
**Samráðingar**

Ráðið er samráðingarlið ímillum foreldrini, leiðaran og kommununa.

**Grein 8**
**Ábyrgd limanna**

Hvør limur í ráðnum hevur tagnarskyldu – eisini eftir, at hann er farin úr ráðnum.

**Grein 9**
**Gildiskoma**

Viðtøkurnar taka við í sambandi við at felags foreldrafundurin verður hildin í september 2016.

Vestmanna Kommuna, 27. apríl 2016

Pauli T. Petersen
borgarstjóri